Álit

í

løgtingsmáli nr. 96/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin) (Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 28. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 31. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 28. apríl, 2. og 9. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Reiðarafelagið, Felagið Nótaskip, Felagið Trolskip, Felagið Línuskip, Felagið Garnaskip, Felagið Verksmiðjutrolarar, Maskinmeistarafelagið, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og navigatørfelag, Kommunufelagið, Landsbankan, landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, saman við Vørn, og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Samgongan er samd um, at rættindahavarar til fiskirættindi eiga at rinda ein munandi, men rímiligan, part av tilfeingisrentuni, soleiðis at hetta virðið kann koma øllum føroyingum til góðar.

Lógaruppskotið byggir á verandi skipan við veiðigjaldi, ið undanfarna samgonga setti í verk. Tað snýr seg sostatt ikki um nakra kollvelting men eina tillaging av verandi skipan. Tó verða ávísar broytingar framdar, millum annað verður talvan fyri sild og makrel longd og gjørd meira stigvaksandi soleiðis, at veiðigjaldið hækkar skjótari, tá ið prísurin hækkar, og lækkar somuleiðis skjótari, tá ið prísurin lækkar. Sambært uppskotinum verður gjaldið lægri, enn tað er í dag, tá ið prísurin er lágur, og hægri, tá ið prísurin er høgur.

Eisini verður sild nágreinað sum norðhavssild og heystgýtandi sild, og sostatt skal veiðigjald frameftir eisini rindast av heystgýtandi sild. Harumframt skal gjald sambært uppskotinum rindast av lodnu, sum av ókendum orsøkum higartil hevur verið undantikin veiðigjaldi.

Meginreglan í uppskotinum er, at sama fiskaslag skal gjalda sama gjald, og undantakið fyri at gjalda veiðigjald av makrelkvotunum, ið heimaflotin hevur, verður strikað. Gjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum verður hækkað nakað.

Meirilutin ásannar, at tá ið tað ikki er greitt, hvussu stór tilfeingisrentan er, er trupult at gera eina skipan, ið er neyvari enn hetta uppskotið. Tað hevur undir viðgerðini verið víst á, at tað kundi borið til at gjørt eina skipan, sum tekur størri hædd fyri oljuprísum og øðrum, sum saman við mongd og prísi ávirkar úrtøkuna av fiskirættindum, men tað verður í hesum føri valt at halda fast við verandi skipan, sum er kend og einfaldari at umsita.

Hvussu stór tilfeingisrentan er, spurdu nærum allir flokkar um við 1. viðgerð, og fleiri partar, bæði umboðandi vinnu og onnur, hava sóknast eftir hesum undir viðgerðini í Fíggjarnevndini. Í uppskotinum er tað tikið til eftirtektar, at ógreitt er, hvussu stór tilfeingisrentan er, og tí hevur samgongan valt at lata ivan koma vinnuni til góðar í ásetingini av veiðigjøldunum.

Tað er ikki greitt fyri meirilutanum, hvør orsøkin er til, at lodna og heystgýtandi sild higartil ikki hava verið partur av skipanini við veiðigjøldum. At hesi fiskasløg nú eisini verða partur av skipanini, tekur meirilutin til eftirtektar.

Tá ið tað kemur til heimaflotan og markelkvotuna, ið hesin hevur fingið tillutaða, er nærum øll politiska skipanin samd um, at hetta er ein stuðulsskipan, og at tað hevði gagnað flotanum betur at fingið fleiri fiskirættindini heldur enn stuðul.

Við hesum uppskoti verður henda skipan ikki avtikin men javnsett við aðrar kvotur av makreli hvat gjaldinum viðvíkur.

Viðgerðin í nevndini hevur víst, at reiðaríini og partvíst manningin hava fingið ein part av ágóðanum av makrelkvotunum. Hesum fáa tey framhaldandi ágóðan av, hóast veiðigjald verður goldið av kvotunum. Tað er eisini ein sannroynd, at tey reiðarí, ið frammanundan gjalda veiðigjald fyri somu fiskasløg, í stóran mun fiska makrelkvotuna, ið er tillutað heimaflotanum.

Fyri framhaldandi at tryggja nøktandi fiskirættindi er áhaldandi neyðugt at hava eina Havstovu á hædd við líknandi stovnar í okkara grannalondum, og tað er áhaldandi neyðugt at hava eina nøktandi trygd á sjónum. Tá ein størri partur av tilfeingisrentuni verður tikin inn, metir meirilutin, at møguleiki átti at verið at tryggja hesi viðurskifti í størri mun.

Tað er ásett, at kommunurnar, sum missa inntøkur orsakað av hesum tillagingum í veiðigjøldum, skulu fáa endurgjald fyri tann missin. Saman við kommununum er komið fram til, at 2 % er ein hóskandi partur, fyri at kommunurnar við vissu ikki missa inntøkur av hesum uppskoti.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið byggir á verandi veiðigjaldslóg, ið undanfarna samgonga gjørdi í seinasta valskeiði. Lógin tekur hædd fyri, hvussu marknaðarprísurin er, og veiðigjaldið verður ásett eftir tí. Veiðigjaldslógin hevur virkað síðan 1. januar 2022, og ætlanin er longu nú at gera broytingar í henni. Minnilutin tekur ikki undir við, at lógin longu nú verður broytt við at senda eina eyka rokning út til fiskivinnuna.

"Tilfeingisrenta"
Í viðmerkingunum til uppskotið stendur m.a. soleiðis:

> "*Samgongan hevur sett sær fyri, at tilfeingisgjøldini í uppsjóvarvinnuni og flotanum í Barentshavinum verða endurskoðað, soleiðis at ein munandi, men rímiligur partur av tí serstaka vinninginum –tilfeingisrentuni –sum vinnulig serrættindi kunnu hava við sær, falla til landið.*"

Hugtakið tilfeingisrenta hevur mangan verið brúkt í orðaskiftinum um fiskivinnuna, og her verður tað brúkt sum grundgeving fyri ætlaðu broytingunum.

Bæði við 1. viðgerð og undir nevndarviðgerðini hevur minnilutin spurt, hvør hendan tilfeingisrentan, ið sipað verður til, er, og hvør er hesin munandi men rímiligi parturin av serstaka vinninginum, ið ætlanin er at taka inn. Svarið er, at man veit ikki, hvør tilfeingisrentan er, tíansheldur hvat ein munandi og rímiligur partur av serstaka vinninginum er.

Tá hendan sonevnda tilfeingisrentan verður brúkt sum høvuðsgrundgeving fyri, at meira skal takast inn frá fiskivinnuni, so kann ein ikki annað enn undrast á, at tá spurt verður, hvat liggur aftanfyri hetta, so er svarið, at ongin veit.

Minnilutin metir tað ikki vera rætt at brúka grundgevingar, ið ein veit, hald ikki er í. Tað er ikki virðiligt fyri tey, sum verða rakt av broytingunum, og sum í hesum førinum er ein av okkara høvuðsvinnum. Spurningurin er, hví ein ikki sigur sum er, at tað snýr seg um eina eyka rokning.

Heimaflotin
Hóast tað í pørtum av fiskivinnuni hevur gingið væl seinastu árini, er ein partur av flotanum, ið hevur ligið í øgiliga tungum sjógvi sama tíðarskeið. Tað er heimaflotin.

Minnilutin undrast á, at tilfeingisgjald skal leggjast á heimaflotan. Tá tosað verður um, at tað skal fáast meir inn av serstaka vinninginum, so er tað ikki í heimaflotanum, at eyga fæst á hann. Hóast nakrir skipabólkar hava havt makrelrættindi, hava hesi ikki havt nakran serstakan vinning við sær.

Ein partur av heimaflotanum er komin so mikið fyri seg, at gomul skip eru skift út við nýggjari skip, og rakstur byrjar at koma í. Nú høvdið er fingið upp undan, kemur ein eykarokning til hendan partin av flotanum.

Sagt verður, at gjaldast skal sama gjald fyri sama fiskaslag, og heimaflotanum verður álagt at rinda tilfeingisgjald. Tá hetta ikki er galdandi allastaðni, undrar tað minnilutan, at valt verður at gera tað í hesum førinum.

Minnilutin metir tað ikki vera rætt at áleggja heimaflotanum tilfeingisgjald. Hóast nøkur av skipunum gagnnýta makrelkvotuna sjálvi, og onnur hava ætlanir um at gera tað, ásannar minnilutin, at tað í flestu førum er ikki so, og man letur onnur fiska kvotuna fyri seg. Tó er tað ikki nøkur loysn fyri heimaflotan at áseta ein eyka skatt.

Ongan skund
Uppskotið varð sent í almenna hoyring við stuttari freist og hevur tí ikki fingið ta neyðuga viðgerðina, áðrenn tað varð borið í tingið. Minnilutin undrast á hetta, tí í veruleikanum hevur tað ikki skund at avgreiða málið. Broytingarnar fyri Barentshavið fáa gildi 1. januar 2024, og hinar fáa gildi 1. august 2023. Mett verður, at broytingarnar fáa lítla og kanska onga ávirkan hesi árini.

Uppskotið leggur upp til, at tilfeingisgjald skal leggjast á lodnu. Lodnufiskiskapurin er liðugur fyri í ár, og tí fær broytingin ikki virknað fyrr enn komandi ár. Uppskotið leggur upp til, at tilfeingisgjaldið á makrel skal hækkast, og tá broytingin kemur í gildi, er makrelfiskiskapurin væl í gongd, so ivasamt er, hvørja ávirkan uppskotið fer at hava.

Minnilutin heldur tað ikki vera í lagi, at uppskotið skal skundast ígjøgnum, áðrenn tingið fer til hús, tá tað eftir øllum at døma ikki er neyðugt.

Óstøðugar karmar
Ígjøgnum nógv ár hevur fiskivinnan livað undir óstøðugum kørmum. Eitt er, at vinnan hvønn dag livir undir óvissum av náttúrugivnum orsøkum, men tann politiski óstøðugleikin fyllir minst líka nógv, og hetta er enn eitt gott dømi um tað.

Seinastu árini hava vit upplivað, at alt eftir hvør situr við valdið, verða politiskar broytingar gjørdar í fiskivinnuni. Í hesum føri verður skotið upp at broyta eina lóg, ið hevur verið í gildi í eitt gott ár, eins og man heldur ikki velur at leingja áramálið á veiðiloyvunum.

Tað hevur við sær, at tað gerst næstan ómøguligt hjá vinnuni at leggja sítt virksemi til rættis, tí teirra umstøður kunnu broytast alt eftir, hvør situr við valdinum. Tíðin er búgvin til, at vit geva fiskivinnuni frið at leggja sítt virksemi til rættis og steðga politiska óstøðugleikanum.

Samgonguflokkarnir hava vart seg við, at vinnan kundi vænta hetta, tí boðað varð frá hesum undan løgtingsvalinum. Hetta er ikki heilt rætt, tí núverandi samgonguflokkar boðaðu í andstøðu frá, at heimaflotin skuldi ikki rinda tilfeingisgjald, tí har var ongin tilfeingisrenta. Heimaflotin hevur ikki væntað sær eina eykarokning, tí hesir flokkar søgdu beint tað øvugta undan valinum.

Veiðigjaldslógin hevur eitt ár á baki, og heimsstøðan er rættiliga nógv broytt, síðani lógin kom í gildi. Stórar óvissur valda á marknaðinum, oljuprísirnir eru hækkaðir munandi, og tað er rentan eisini. Hetta tyngir munandi um raksturin hjá vinnuni. Eisini valda stórar óvissur um nøgdirnar, ið hesi skip fara at fiska. Kvotan í Barentshavinum hevur verið lækkandi, og fæst semja millum strandarlondini, lækka uppsjóvarkvoturnar allarhelst eisini. Tí metir minnilutin tað ikki vera rætt, at man longu nú fer at skrúva upp á gjøldini aftur.

Samanumtikið tekur minnilutin ikki undir við, at hesar broytingarnar verða framdar. Verandi lóggáva hevur bert eitt ár á baki, og hon eigur at sleppa at virka víðari.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum, og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. mai 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	